## ECA: Ymiskar eftirlitsætlanir í sambandi við gildiskomuna av nýggju útlátskrøvunum – Yvirskipað kunning

Sum boðað frá í tíðindabrævi 13/2014 – Rakstur, koma í so nevnda ECA-økinum (Emission Control Areas ) nýggjar reglur viðv. útláti frá skipum í gildi tann 1. januar 2015. Høgu prísirnar á bunkersolju við lágum svávulinnihaldi og kostnaðarmiklu teknisku loysnirnar at reinsa útlátið gera, at havnamyndugleikar í Evropa vænta, at eigarar og skip fara at royna at bera seg undan reglunum.

**Millumtjóða samstarv**

Í norður Evropa eru ymisk samstarvsátøk á veg tvørtur um landamørk, til tess at seta reglurnar í gildi.

Dømi eru:

- Paris MoU: Niðurlond og Danmørk hava lagt uppskot fram í Paris MoU um hert átak, so nevnda *Concentrated Inspection Campaign*, eisini kent sum Paris MoU CIC.
- MAIG: ***M**aritime **A**dministrations' **I**mplementation **G**roup* er samstarvsbólkur av fleiri londum (Týskland, Danmørk, Noreg, Niðurlond, Svøríki, Finnland, Belgia og Stóra Bretland), har verður arbeitt við einum felags støði fyri sjóvinnumyndugleikar at gera eftirmetingar av "áhaldandi bata", sum skal verða til hjálpar, tá ið samanberingar verða gjørdar tvørtur um landamørk.
  Hesin bólkur av londum hevur sett átak í gongd, sum skal tryggja, at eftirlitið við krøvunum verður gjørt á samskipaðan hátt.
- HELCOM: Úr londunum við Eystara Salt er samstarvsbólkur settur at kanna/meta um átøk, ið kunnu gerast, til tess at tryggja tættari samstarv landanna millum har í økinum.
- ESSF: Av *European Sustainable Shipping Forum* verður felags átak gjørt, til tess at leggja fram uppskot fyri ES-stjórnini um stuðul til at samskipa hagtøl og skjalfesting. Áðrenn gildiskomuna av nýggju krøvunum ætlar ESSF at fáa sett saman viðkomandi upplýsingar, ið skulu veitast skipaeigarum og bunkersveitarum, til tess at tryggja, at allir partar fáa møguleikan at gera seg kendar við og skilja reglurnar væl.

**Nýggj tøkni**

At fáa reglurnar at rigga sambært ætlanum og hugsjónum, krevur nøktandi eftirlit. Nýggir arbeiðshættir og amboð at kekka innihaldið av SOx í bunkersolju fara at vera tikin í brúk.

Men eisini snýr tað seg um at gera kendar mannagongdir meiri virknar:

- "Sniffara"-verkætlanir: Í januar 2014 hevur t.d. Danmørk sett í gongd royndarverkætlan við at seta upp sonevndan "sniffara" á brúnni um Stóra Belt. Verkætlanin skal halda á árið út.
- Dróna-verkætlan: Samstundis við omanfyri nevndu verkætlan, er uppaftur onnur, ið miðsavnar seg um at menna drónur til at máta útlát frá skipum. Verkætlanin skal halda á árið út, við serstøkum átaki summarið 2014 at máta útlát frá skipum.
- Horizon 2020: Fleiri lond hava tikið seg saman viðv. samskipað umsókn til ES-stjórnina, nevnd "EfficienSea2", til tess at fáa fígging úr grunninum "Horizon 2020". Stuðul til fremjan og eftirlit sambært reglunum um útlát eru kjarnin í hesi umsókn.
- TEN-T: Finnland hevur tikið stig til óformligt torg fyri sjóvinnumyndugleikar, og umboð frá fleiri londum taka lut í hesum samstarvi. Endamálið er at eggja til menning og nýtslu av nýggjum eftirlitsamboðum.

- Í Danmark: SFS boðar frá, at ítøkiligar ætlanir eru um at styrkja eftirliti. Hesar ætlanir fevna m.a. um:
    - Nýggj mátingartól, sum eftirlitsfólk bera við sær. Tólini geva ábending á staðnum, um brot eru á reglurnar,
    - Talið av bunkersroyndum umborð á skipum skal økjast
    - Máting av luft fyri at avgera innihaldið eitrandi evnum útláti (“sniffers”)

**Kunning til vinnuna**
Sjóvinnumyndugleikar leggja eisini dentin á, at umráðandi er við kunning til vinnuna. Í norðurlondum verða felags átøk gjørd í t.d. ECSA (The European Community Shipowners’ Associations) og ICS (International Chamber of Shipping).

Sigast kann frá, at ECSA arbeiðir við einum so nevndum felags niðurstøðusskjali/kunngerð viðv. fremjan av eftirliti. Undir skjólinum hjá ICS verður kanning gjørd viðvíkjandi arbeiðshættum, sum sjóvinnumyndugleikar nýta til tess at handhevja reglurnar. Sum frá líður fara úrslitini frá hesum arbeiðinum at vera tøk fyri skipafeløg o.ø.

Fleiri lond samstarva harumframt um uppskot at leggja fram í IMO viðv. eftirliti og “Best Practice”, og millum teirra við drívmegi er Danmark eitt. Vónandi fer hetta arbeiði at tryggja eins eftirlit og handhevjan av reglunum.

**Skip undir FAS**
Tí at meginparturin av FAS-flotanum siglir inn og út úr nevnda ECA-økinum í Evropa, verður henda fyribils kunning send út. Økið fevnir um syðra partin av norsku strondini, danskan sjógv, Eystara Salt, Ermarsund og allar havnir í hesum økinum.

Vónin er so tíðliga sum gjørligt at varpa ljós á avbjóðingina fyri skip og manning.

So langt tað letur seg gera fer Sjóvinnustýrið at fygja við viðvíkjandi tilfari, ið verður sent út frá ymisku bólkunum og myndugleikunum, ið eru nevnd omanfyr,i eins væl og við kunning frá granna-myndugleikum, til tess at halda FAS-flotan kunnaðan um átøk og hert eftirlit, ið munnu fara at koma.

Harafturat, skal Sjóvinnustýrið við hesum eisini eggja skipaeigarar til at taka ábyrgd og gera alt, ið gerast kann, fyri at fáa ígøgnum rættar mannagongdir umborð. Eisini mugu skipafeløg syrgja fyri at veita skiparum vitan um krøvini og annars arbeiða fyri, at skiparar og manning gerast tilvitaðir um reglurnar.

--- 00 ---